

## Øðrvísi flaggdagshald á Eiði

Flaggdagshaldið á Eiði byrjar klokkan 14 sum vanligt er við, at ítróttarfólk og skúlabørn ganga skrúðgongu úr Múlavík heim á Vaglið, har Annsy Høghamar heldur flaggdagsrøðuna, og Eiðis Ljómfelag spælir. Klokkan 15 lata framsýningarnar í skúlanum við næmingaavrikum skúlans og kvøldskúlans upp. Vevstovan í Bláapakkhúsinum hevur framsýning av vovnum lutum, til dømis føroyskum klæðum, og kvinnur vísa, hvussu aldargamla handverkið við ullarbeiði skal gerast. Hesar framsýningarnar eru opnar til klokkan 19.

EB skipar klokkan 15 fyri loppumarknaði, og har verður kaffisøla. Klokkan 16 hevur EB tombola. Klokkan 15.30 verður sangløta, og tá syngur Eiðisstovukórið. Í kórinum eru limir í Eldrafelagnum á Eiði. Ein filmur um torvskurð á Eiði verður sýndur bæði klokkan 16 og klokkan 17. Ein málningaframsýning verður eisini. Flestu málningarnir eru av kendum lokalum málarum sum Óla Egilstrøð, Niels Kruse og Sigrun Gunnarsdóttir, men har verða eisini at síggja málningar eftir Jóannis Kristiansen, Zacharias Heinesen og Torbjørn Olsen.

Eiðis skúli og kvøldskúli, Eiðis kommuna og Eiðis Bóltfelag skipa fyri øllum hesum tiltøkum.

*randi@sosialurin.fo*

# Dora vald í kommunustýrið

**KOMMUNUVAL** Dora Joensen vann valið í Húsa kommunu týsdagin og er nú harvið kommunustýrislimur

Randi Jacobsen

35 av teimum 40 fólkunum, sum høvdu valrætt, luttóku í kommunuvalinum á Húsum týsdagin.

Tveir listar vóru, og annar fekk 18 atkvøður og hin 17.

Á lista A varð Dora Joensen fyrst vald við 13 atkvøðum, og reglurnar eru, at tiltakslimirnir eru valevnini á sama lista.

Tiltakslimirnir eru Jóanes Jonsen og Símun Høgnesen.

Á hinum listanum vóru Sylvin Rasmussen, Sólarn Isaksen og Bjarti Joensen.

Neyðugt var at hava kommunuval í úrtíð í Húsa kommunu, tí bara tveir limir vóru eftir í kommunustýrinum, og eingin eykalimur var heldur eftir.

*randi@sosialurin.fo*



*Kommunustýrið í Húsa kommunu er aftur fullmannað*

# Grava fyri røktarheiminum



*Ellis- og røktarheimið skal byggjast á Grønanesi*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

**BYGGING** J & K Petersen Contractors er farið undir at gera økið til ellis- og røktarheimið í Vestmanna byggibúgvið

Randi Jacobsen

Maskinurnar hjá byggifelagnum J & K Contractors hava sett á at grava á Grønanesi í Vestmanna, har byggjast skal eitt ellis- og røktarheim.

Hetta byggifelag hevur fingið jørðarbeiðið, sum eisini fevnir um at leggja kloakkir. 1. september skal økið verður byggibúgvið.

Avgravaða moldin verður koyrd á tyrvingarplássið hjá IRF.

Næsta byggistigið verður sjálvt byggiarbeiðið, og nøkur feløg eru undangóðkend at bjóða. Teirra millum er J& K Petersen.

## Barnatalið veksur í Sundalagnum

Randi Jacobsen

Sunda kommuna veksur, og tað sæst væl á skúlabarnatalinum.

– Í ár eru 73 næmingar, næsta ár verða teir 77, og um tvey ár fer barnatalið upp um 80, sigur Sonni Djurhuus, skúlastjóri í Norðskála-Oyrar skúla.

Í nøkur ár hevur verið tosað um at útbyggja skúlan, men ráðini eru ikki tey bestu beint nú at gera eina slíka íløgu.

Undirvísingin hjá næmingunum í smíð og í køki hevur alla tíðina verið í Felgsskúlanum á Oyrarbakka, og tá ið hetta skúlaárið byrjar, varð undirvísingin í hondarbeiði eisini flutt í hin skúlan. Hetta hevði við sær, at Norðskála-Oyrar skúli fekk eina stovu aftrat.

– Okkum vantar eina skúlastovu, men við góðum vilja man tað fara at ganga, sigur Sonni Djurhuus, sum eisini heldur, at skúlin hevur verið heppin við at hava so nógvar dugnaligar lærarar.